# North Atlantic Economic Forum

**North Atlantic Economic Forum er altjóða ráðstevna um framtíðar vinnumøguleikar í Norðuratlantshavi. Evnið er sera aktuelt nú tað brýtur um bæði borð í fíggjarkervum heimsins, og matvøru og oljuprísir trýsta. Hvørjum skulu vit liva av í framtíðiniog hvussu ávirka hesi rák okkum?**



*Føroyar, Grønland og Ísland sita á stórum øki tilsamans*

KRONIKK
*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*



Heimurin er skakaður av ógvusligu fíggjarligu rembingunum seinastu tíðina. Vit síggja eitt rák í vesturheimi við sera stórum váðafýsni, ovurnýstlu og eitt altjóðagjørt bankakervi, sum er samantvinna á ein slíkan hátt, at ongin torir at meta um hvør megnar at standa ímóti í verðandi kreppuni .Hetta ávirkar eisini okkum í Norðuratlantshavi

Stjórninar taka yvir og/ella hjálpa størri bankum við at bjarga tí sum bjargast kann. Í USA hava Bush forseti og Bernanke tjóðbankastjóri heitt á kongressina og senatin um at taka undir við einum sera stórum hjálparpakka til amerikanska fíggjarkervið og ES londini royna í felag at gera ein pakka .

Eisini vit í Norðurlondum merkja hesar ógvusligu rembingarnar á fíggjarpallinum, men hetta er bert eitt fyribrygdi av mongum broytingum vit síggja í dag. Kanska serliga øki í Norðuratlantshavi, sum umfatar Føroyar, Grønland og Ísland fer at merkja stórar broytingar. Í Íslandi stendur á gomlum nøglum fyri at koma best gjørligt úr fíggjarkreppuni í eini tilgongd, sum kanska broytir kapitalismu og alheimsgerð soleiðis sum vit kenna hesi fyribrygdi í dag. Vit standa á tromini í eini broytingartí-.

## Norðuratlantshavið á breddan

Veðurlagsbroytingar, orkukeldur og náttúruríkidømi hava sett Norðuratlantshavið og Arktiska økið á altjóða breddan. Føroyar, Ísland og Grønland liggja mitt í hesum øki og kunnu vit við samstarvi standa munandi sterkari.

Norðuratlantiska og Arktiska økið uppliva í hesum árum umfatandi veðurlagsbroytingar, og mett verður at komandi tíggju árini fara at hava stórar broytingar við sær á landafrøðina, vistfrøðisskipanina og á sosiala og búskaparligar bygnaðin. Hetta fer helst at ávirka týðandi vinnugeirar í Norðuratlantsøkinum, so sum oljuvinnu, námsvinnu, flutningsvinnu, fiskivinnu og ferðavinnu

Endamálið við ráðstevnuni er at finna nýggjar vinnumøguleikar, sum hesar broytingar geva okkum. Sostatt verður hugt eftir fyrimum heldur en vansum, orsakað av veðurlagsbroytingunum.

## Geopolitikkur

Vit vita, at Ísland, Føroyar og Grønland høvdu stóran strategiskan týdning undir Kalda Krígnum, men eisini at talan var um útjaðara samfeløg. Tøkniliga menningin á samskiftis- og flutningsøkinum ger, at hesi lond ikki eru ein útjaðari longur. Atgongdin til vitan og samskifti minkar um týdningin av hvar ein er staddur, og flutningurin hevur við sær, at modernaðir hentleikar eru til taks.

Føroyar, Ísland og Grønland liggja í dag í einum øki, sum kanska fær størst uppmerksemi tá talan er um veðurlagsbroytingar. Føroyar, Ísland og Grønland sita á einum ógvuliga stórum og ríkum havøki. Øll trý londini er á veg inn í oljuvinnu, og hava stórt náttúruríkidømi ið kunnu sum smá lond fáa stóran fyrimun av samstarvi landanna millum.

## Vitan

Náttúrtilfeingið er stórt, men kanska liggja stórstu møguleikarnir í at gangnýta vitan og tann áhuga alheimurin hevur í økinum. Økið gerst sera áhugavert orsaka av áhuganum í Norðurpólinum, siglingarmøguleikunum í útnyrðings- og landnyrðingsleiðunum, og ikki minst áhugan hjá Russlandi í valdinum í økinum. Føroyar, Ísland og Grønland eru farin frá útjaðara til miðdepil og er tað givið at ES, Russland, Kanada og USA hava sera stóran áhuga í at verða til staðar her.





*Millum fyrilestrahaldararnar eru Føroya løgmaður, uttanríkisráðharri Føroya og forsætisráðharri íslands*



*Íslendski proffessarin Friðrik Már Baldursson tosar um íslendska fíggjarkervið og býtið millum statin og tað privata*



*Dr. Donald Gautier, Chief Scientist, U.S. Geological Survey*



*Russar hava játtað Íslandi lán og vísa hervið geopolitiska áhugan í Norðuratlantshavi*

Ráðstevnan verður skipað í fýra høvuðsevniog er í tveir dagar. Ráðstevnan verður sett av íslendska forsætisráðharranum, Geir H. Haarde.

Tær fýra verkstovurnar eru:

- **Búskaparrák - í heiminum og í Norðuratlantshavi**
- **Náttúruríkidømi, burðardygg orka og vitanarbúskapur**
- **Fríhandil og íløgumøguleikar í Norðuratlantshavi**
- **Politisk menning og útlitini fyri samstarvi í økinum**

Fyrilestrahaldarar eru altjóða og lokalir serfrøðingar á hesum fýra økjum, umframt at vinnulívsfólk og ráðharrar úr Føroyum, Grønlandi og Íslandi eisini fara at halda fyrilestrar.

The North Atlantic Economic Forum er eitt samstarv millum North Atlantic Conference, sum er ein felagsskapur við limum úr Íslandi, Grønlandi og Føroyum og Reykjavíkar Universitet, hvørs endamál er at leggja lunnar undir nýggjar samstarvshættir, og búsparliga menning í Norðuratlantshavi.

Ælanin er at gera hetta við at hýsa ráðstevnum um evni sum hava felags áhuga hjá vinnuni og politiska geiranum í hesum trimum londum, og á henda hátt at birta uppundir nýggja vitan um møguleikar fyri mennning í hesum økinum.

Endamálið við ráðstevnuni er sostatt at seta sjóneykuna á hvørjar nýggjar møguleikar veðurlagsbroytingar hava við sær í samband við náttúruríkidømi, ídnaðarmenning og altjóðagerðina av alheims handli og vinnu.

Meira sæst um ráðstevnuna á www.naef.is